átrúnaður



orðið

## Alt ber Guds merki



John S. Myllhamar

**„Og Guð leit at øllum, sum hann hevði gjørt, og sí, tað var sera gott".**
1. Mósebók. 1, 31.

Gjøgnum alla skapanarsøguna hoyra vit hendan tankan. Eftir at hvør nýggjur lutur er skapaður, sá Guð, at alt var gott, ið hann hevði gjørt. At enda stendur tað so, at alt samalt var sera gott.

Men tað er væl skiljandi, tí tað kann ikki koma annað enn gott frá Guðs hond. Hin góði Guð kann bara gera góðar lutir. Tað má natúrliga bera merki av honum, sum hevur gjørt tað.

Tað er løgnari, at tað yvirhøvur í tí heimi, sum Guð hevur skapað, er nakað, ið ikki er gott. Men av tí slagnum yður tað av. Heimurin er, hvat tí viðvíkur, farin av lagið, so at tað skal trúgv til fyri at síggja, at hann hevur nakað við Guð at gera. So nógv liggur í sori. Heimurin er vorðin spiltur av brúki. Tað er greitt, at Guð kann ikki hava skyldina í, at tað stendur so illa til við tí heimi, hann hevur skapað; tað má vera okkara skyld. Hetta kemst av, at vit eru sloppin at fonglast við lutirnar. Vit sluppu at vera harrar yvir lutunum, men gloymdu, at Guð sjálvur skuldi vera Harri yvir okkum. Tey, sum ikki vilja at nakar skal ráða yvir teimum, duga ikki at ráða yvir øðrum.

Skal tað verða betri við heiminum og við lutunum í okkara egna lívi, kann tað bara henda við, at Guð aftur gerst Harri yvir øllum, ið hann hevur skapað, og at vit gerast nóg lítil at vilja tæna honum við øllum tí, hann hevur litið okkum til.

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*

# Ynskja meiri missión í samkomurnar

**Í løtuni verður arbeitt við at fyrireika samfelagsstevnuna á Skálafjørðinum, sum hesa ferð fer at snúgva seg um missión**

**Páskastevnan byrjar 5. og endar 8. apríl, og verður hildin í ítróttarhøllini í Runavík**

**Runavík:** Hesa seinastu tíðina hava umboð fyri tær fýra brøðrasamkomurnar á Skálafjørðinum arbeitt við at fyrireika páskastevnuna.

Umboð fyri samkomurnar í Nerija á Skála, Elim í Søldarfirði, Berøa í Saltangará og Nebo á Toftum hava gjørt av, at páskastevnan burturav skal snúgva seg um missión.

Málið við stevnuni er at kunna um og harvið økja um tilvitanina í samkomum og millum einstaklingar um missión.

– Tað snýr seg sjálvandi um hjørtuni. Spurningurin fer at verða reistur, hvussu samkomur og einstaklingar enn betri kunnu vera við til at økja tann stóra partin av samkomuvirkseminum, sum eigur at snúgva seg um trúboðan, verður sagt.

Tey, sum manna bólkin, ið fyrireikar stevnuna, eru Jens Olsen, Anita Tausen, Dánial í Skemmuni, Jens Bech og Símin í Túni.

### Framsýning um missión

Hóast nakað væl er enn til tiltakið verður, eru fyrireikingarnar longu komnar so langt, at høvuðstalarin er fingin til vega.

Óhugsandi er haraftrat ikki, at onkrir av føroysku trúboðarunum, sum arbeiða uttanlands fara at vera á stevnuni.

Høvuðstalari í ár verður Paul McIlwain úr Australia. Hann er ein av høvuðsábyrgdarmonnunum hjá felagsskapinum New Tribes Mission (NTM) í Australia. Hann er haraftrat limur í alheims aðalnevndini í felagsskapinum, har Óli á Grømma úr Klaksvík er formaður.

Hetta er kortini ikki fyrstu ferð, at hann vitjar Føroyar. Fyri fáum árum síðani vitjaði Paul McIlwain her saman við Óla á Grømma og fleiri øðrum umboðum fyri NTM.

Í 2001 var stór missiónsframsýning í ítróttarhøllini í Runavík. Millum tjúgu og tredivu stovnar, felagsskapir og átøk, sum vóru sprottin av samkomuvirkseminum kring landið, sýndu fram. Fyri mong var hetta ein stórur íbirtari og kveikjari, bæði fyri tey, sum høvdu ábyrgd av tiltøkunum, og tey sum vitjaðu.

Hesa ferð hava fyrireikararnir leigað eitt stórt telt, sum verður sett upp við síðuna av ítróttarhøllini. Í teltinum verða fleiri av tiltøkunum, soleiðis at fólk kunnu geva sær góðar stundir at vitja framsýningina, uttan at tað fer at órógva tiltøkini.

# Kolveltingarleiðarar í Kelduni á páskum

Tey eru stovnarar av "Jesus Revolution" og "Ny Generation", sum hava spreitt seg sum ringar í vatni um alt Evropa tey seinastu árini. Á páskum verða tey høvuðstalarar í Kelduni.

Skálafjørður: Hjúnini Stephan og Anne Christiansen, sum verða høvuðstalarar á Páskastevnuni 2007, eru sera virkin innan andaligt arbeiði.

Í 1996 stovnaðu tey "Ny Generasjon", sum er ein felagsskapur, ið arbeiðir ímillum studentar í 15 londum. Umleið 16.000 ungdómar eru í dag knýttir til henda felagsskap.

Longu árið eftir fóru tey í holt við tiltakið "Jesus Revolution", sum røkkur til fleiri enn 300.000 ungdómar í Evropa. Umleið 400 ungdómar hava givið eitt, tvey ella fleiri ár í fulltíðar tænastu ígjøgnum hetta tiltakið.

Umframt hetta hava Stephan og Anne grundlagt samkomuna



"Jesus Church" í Oslo, og Anna hevur eisini stovnað felagsskapin "Jesus Kvinner".

Hjúnini eru kend fyri at boða kristna boðskapin livandi, kreativt, nýhugsandi og inspirerandi.

## 71 ung á siglandi ungdómslegu

**Heimamissiónin:** Tá Norröna legði frá bryggju í gjárkvøldið og setti kósina móti Bergen, var hetta samstundis byrjanin til eina ungdómslegu hjá Heimamissiónini.

Legan verður lutvíst umborð og lutvíst í landi í Noregi, har hesir 71 luttakararnir somuleiðis fáa høvið at hitta kristnan ungdóm úr Noregi.

Umborð á Norrönu verður undirvísing í Bíbliuni, meðan tey leygarkvøldið at luttaka á einum stórum ungdómsmøti í Bergen.

Sunnumorgunin kemur Norrøna aftur eftir luttakarunum í Bergen, fyri síðan at føra tey heim aftur til Føroya, higar tey koma mánamorgunin.

## Prestur vitjar Ørkina

**Reykjavík:** Hvønn einasta sunnudag er møti á føroyska sjómansheiminum Ørkin. Men fyrsta vikuskifti í mánaðinum fáa tey vanliga vitjan úr Føroyum. Hetta vikuskiftið fær Hotel Ørkin vitjan av prestinum Meinhard Bjartalíð úr Lamba Í samband við hesa vitjanina verður hugnakvøld leygar kvøldið, og føroysk gudstænasta í Háteigskirkjuni sunnudagin kl. 15. Aftaná tiltøkini er drekkamuður á Ørkini.

## Evnisdagur um kristna felagsskapin

**Hvalvík:** Leygardagin 17. mars skipa Agape og Heimamissiónin fyri einum dagsskeiði um tann kristna felagsskapin. Skeiðið er opið fyri øllum, ið hava áhuga at uppbyggja eitt arbeiði í missiónshúsinum. Við hesum tiltakinum verður dentur lagdur á at lýsa tann kristna felagsskapin sum eina familju, har allir limirnir skulu kunna mennast og trívast. Undirvísari er psyko- og familjuterapeuturin Steen Palmqvist.

## Í býin at hitta onnur ung

**Oasan:** - Vit síggja fleiri og fleiri ung koma til møtini. Og vit síggja at fólk eru íðin at fylgja Jesusi eftir, og ynskja at tæna øðrum við at fara út í tænastu, sigur Trygvi Dam frá ungdómsbólkinum í Hoyvík Hvørt fríggjakvøld eru fólk úr bólkinum í býnum, har tey koma í samband við onnur ung og tosa við tey um andaligar spurningar. - Hetta er sera mennandi fyri okkum sjálvi, tí vit síggja eisini at hetta ger stóran mun, sigur Trygvi Dam.

## Uppskot um navnabroyting

**Kirkjuráðslimir:** 17. mars verður aðalfundur í felagnum fyri Kirkjuráðslimir hildin í Meinigheitshúsinum í Havn Á skránni er millum annað eitt uppskot um at broyta navnið á felagnum til Felag fyri Kirkjuráð. Við hesi broytingini fer tað at verða lættari at fáa fatur á øllum kirkjuráðslimunum kring landið, ikki minst tá felagsblaðið Kirkjutíðindi skal sendast út. Skráin fyri aðalfundin fevnir eisini um eina viðmerking til kirkjuligu støðuna, sum Ove Conrad Hansen stendur fyri. Formaður í felagnum er Tummas Lauritsen.